# Næmingarnir krevja fund við myndugleikarnar

**Datamatikaranæmingarnir á Føroya Handilsskúla í Havn vilja hava fund við Mentamálaráðið, tí næmingarnir eru ikki nøgdir við støðuna, eftir at lærararnir hjá teimum hava sagt seg úr starvi**

SKÚLASTRÍÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Næmingarnir, sum taka útbúgving sum datamatikarar á Føroya Handilsskúla, hava sent Mentamálaráðnum eitt bræv, har tey biðja um at fáa ein fund um støðuna, sum tey eru komin í.

Báðir lærararnir hjá datamatikarunum hava sagt seg úr starvi, tí tey hildu seg ikki kunna arbeiða undir teimum umstøðum, sum tey høvdu á skúlanum. Síðani hevur leiðslan á Handilsskúlanum lagt eina ætlan fram um, hvussu teir 11 næmingarnir kunnu gera sína útbúgving lidna.

Men hóast leiðslan sigur seg vilja finna eina fullgóða loysn, kenna næmingarnir seg ikki tryggir við støðuna. Teir stúra fyri dygdini í undirvísingini, og at prógvið ikki fer at hava tað virðið, sum tað skuldi havt.

### Manglar førleika

Í brævinum til Mentamálaráðið siga næmingarnir, at tað í eina tíð hava verið trupulleikar við útbúgvingini hjá teimum, og at tey síggja støðuna at vera kritiska. Tí ynskja tey fund við Mentamálaráðið.

– Vit hava verið á fund við leiðsluna á Føroya Handilsskúla í Havn og eru sannførd, um at leiðslan ikki hevur nøktandi førleika at loysa hesar trupulleikar. Vit stúra eisini fyri dygdini á útbúgvingini undir núverandi umstøðum, siga næmingarnir í brævinum til Mentamálaráðið.

Mánadagin hevði Mentamálaráðið ikki svarað brævinum frá næmingunum, og tí skrivaðu tey ein rykkjara til ráðið.

Næmingarnir vóru mánadagin í skúla, hóast tey eru misnøgd við støðuna. Tey halda seg tó ikki hava aðrar møguleikar, enn at fylgja undirvísingini á Handilsskúlanum.

# Norðoyastevnan gongur aftur

**Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð heldur, at tað ávirkar Norðoyastevnuna, at so nógv onnur tiltøk eru samstundis kring landið. Í ár var veðrið hampuligt á Norðoyastevnu, men sunnudagurin royndist ikki so væl sum onnur ár**

NORÐOYASTEVNA

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Børnini stuttleikað sær óført í tivoli, har tað millum annað bar til at tveita bóltar eftir blikkum*

Norðoyastevnan 2005 er farin aftur um bak, hon gekk sambært fyrireikarunum væl. Veðrið var betri, enn tað ofta hevur verið, hóast tað var nakað kalt – serliga sunnudagin.

– Reint praktiskt gekk tað væl við Norðoyastevnuni. Tað er altíð okkurt smáting, sum ikki gongur eftir vild, men samanumtikið gekk tað væl, sigur Símun Michael Sørensen, nevndarlimur í Norðoya Frítíðar og Ítróttarráði (NFÍ). Tað er NFÍ, sum samaskipar Norðoyastevnuna.

– Leygardagurin var góður, men vit merktu, at tað var eitt sindur minni av fólki á Norðoyastevnu í ár, enn tað hevur verið undanfarin ár, og serliga sunnudagin sást tað aftur, sigur Símun Michael Sørensen.



*Sunnudagin varð skrúðgonga við skótum, hornorkestri, reiðfólki og ítróttarfólki. Í Vágstúni helt borgarstjórin í Klaksvík røðu til fólkafundin*

### Stevnan manglaði fótbólt

NFÍ heldur, tað eru fleiri orsøkir til, at undirtøkan fyri Norðoyastevnuni í ár var nakað minni, enn hon áður hevur verið.

– Tað merkist, at tað eru nógv tiltøk kring landið, samstundis sum Norðoyastevnan verður hildin. Hóast tiltøkini eru ymisk, so binda tey fólk, og tað eru færri fólk, sum koma til Klaksvíkar, heldur Símun Michael Sørensen.

– Tað var eisini ein stórur vansi fyri Norðoyastevnuna, at so at siga eingin fótbóltur var. Landsdysturin gjørdi, at eingin annar fótbóltur var á skránni, og sunnudagin hevði tað við sær, at færri fólk enn vanligt komu út.

NFÍ heldur, at tað er spell, at tað verður skipað fyri so nógvum tiltøkum, samstundis sum Norðoyastevnan verður hildin, men NFÍ viðurkennir eisini, at í ár vóru fleiri tiltøk hildin, sum ikki verða afturvendandi á hvørjum ári.

– Feløgini fingu eitt sindur burtur úr Norðoyastevnuni, og fleiri teirra hava eisini víst ein vilja til atgera eitt sindur meira burturúr. Men skal nakað serligt gerast, so er tað ein spurningur um pengar, og um eitt nú kommunan vil stuðla stevnuni við eini størri upphædd, sigur Símun Michael Sørensen.



*Kappkoyring í smáum bilum var væltumtókt millum børnini*



*Tað ber altíð til at fáa eitt gott prát á Norðoyastevnu*